
Eg hvørki hyggi í sjónvarp ella lesi bløðini, so ein politiskur listamaður trúgvi eg ikki, at eg nakrantíð verði

MYND: PRIVAT

# Aldur

Dømi um vælkomponeraðar myndir í filminum »Aldur«



áður hava sæð innan føroyska list. »Yvirhøvur haldi eg, at tey ungu listafólkini eru nógv meira persónlig í teirra list í mun til tey eldru. Veit ikki hví so er, men tað er hvørfall sera spennandi. Kanska tí vit eru meira frí? Tað tykist, sum føroysk listafólk hava arbeitt við teimum somu motivunum nú í eini hundrað ár. Sigast skal tó, at framsýningin Svart og Reytt, sum eg var til í Steinprenti í síðstu viku var góð og ørvísi, so okkurt gott er…«

## Onki umhvørvi

Á einum sera viðkomandi fundi um list, ið var fyri kortum í Miðlahúsinum, greiddi Inger Smærup Sørensen í áhugaverdari framløgu frá, at tað stendur illa til við føroysku listini. Til dømis um vit hyggja eftir, hvar tey ungu listafólkini búleikast, tí tað er ein sannroynd, at ógvuliga fá búgva í Føroyum. Eg havi ikki tølini, men vóni, at lesarin fær høvið at kanna tey, tá okkurt av okkara bløðum ella tíðarritum raðfestir listina so frægt, at tey gjalda uppleggshaldaranum fyri at skriva eina grein um evnið. Hvussu er og ikki, eru tølini ófrættakend, so eg spyrji Heiðrik á Heygum um hann er partur av einum listarligum umhvørvi í Føroyum. Hann svarar eitt sindur ørkymlaður: »Um tað er nakað listarligt umhvørvi í Føroyum, so veit eg ikki av tí. Mítt listarliga umhvørvi havi eg saman við vinfólkum, ið hava somu áhugamál sum eg. Eri helst eitt av teimum mest ópolitisku menniskjunum í verðini. Eg hvørki hyggi í sjónvarp ella lesi bløðini, so ein politiskur listamaður trúgvi eg ikki, at eg nakrantíð verði«

> Um nakað listarligt umhvørvi er í Føroyum, so veit eg ikki av tí

## Sterkt silki

Heiðrik er, sum áður nevnt, ómetaliga fjøltáttaður listamaður og hevur gjørt fløguhúsar, scenografi og annað umframt myndlist, tónleik og film. Í øllum, sum hann ger, er Heiðrik super-estetikari og tí var tað við serligum spenningi, eg hugdi at filminum »Aldur«, sum filmsliga er ein stuttur, poetiskur dokumentarfilmur, ið er settur saman av óvanliga væl komponeraðum myndum. Undirritaða er sjálv so mikið tónleikaliga og myndaliga hugaður persónur, at eg í fyrstu syftu ikki fekk ta fantastisku, lívsjáttandi søguna um svimjiommuna við. Og hetta var ikki, tí søgan var torskild ella illa frágreidd. Tað vóru frálíku meditativu tónar Brynjolfs á Heygum og sjálvar myndirnar, ið hugtóku og sótu eftir í sinninum. Myndir, sum eru skaptar av einum myndlistamanni, ið hvar hann hyggur, fær eyga á stórbæran vakurleika. Á nógvum av myndunum sæst, at Heiðrik hevur ein forkærleika fyri symmetri og monumentaliteti, eins og myndirnar úr filminum eru so tilfarsliga sterkar, at tú sum áskoðari veruliga følir teg kínda av mjúka silkinum í fína borðdúkinum hjá svimjiommuni, eins og tú fært nøtrandi gásarhold, tá konan traðkar út í ísakalda sjógvin.

> Føroysku listakvinnurnar eru meir kenslubornar enn menninir, sum bara mála landsløg

Myndirnar hjá Heiðrik eru ofta trýbýttar í bygnaði, eins og hann ofta nýtir eina sonevnda pyramidukomposition í myndum sínum. Á tí økinum eru hansara myndir ikki so fjarar frá jarðarferð Mikinesar, sum ein skuldi hildið. Serligi myndabygnaðurin hevur við sær javnvág og autoritet og ein næstan religiøsan dám í myndum, sum geva hugasamband við náttúrureligiøsa huglagið í myndunum hjá gamla týska romantikaranum Caspar David Friedrich

Heiðrik greiðir sjálvur frá, at hansara mál við filminum var at vísa, hvussu hann sær ommu sínu: »Eitt portett, sum eg haldi ongin annar kann gera, tí tey ikki kenna hana persónliga. So tað var faktiskt bara vakurleikin, eg var áhugaður í: Vakurleikin í, hvussu hon hevur livað sítt lív og vakurleikin í, hvussu hon yvirlivir. Filmurin snýr seg ikki um eina gamla konu, sum svimur á sjónum hvønn dag, men um trúgv og yvirlivilsi. Nakað, ið vit øll kunnu relatera til…«

Tá undirritaða at enda spyr typiska endaspurningin um framtíðarætlanir, kemur eitt ljóðligt suff frá listamanninum, sum sigur, at framtíðin er farin at ørkymla eitt lítið sindur. Men fyrst skal ein fløga gevast út, og síðan er tað listaframsýningin í summar, ið skal fyrireikast. Vit ynskja Heiðrik góðan byr og eru so smátt farin at spíska blýantar, meðan vit gleða okkum til aldurdómin.